# Havnin eigur tjóðarhátíðina

**– Tað er einki at ivast í, at ólavsøkan er okkara tjóðarhátíð, men landið ger einki annað enn at ganga skrúðgongu úr Tinginum oman í dómkirkjuna og niðan aftur. Tórshavn stendur við ábyrgdini, bæði tá tað ræður um fyrireiking og um fíggjarliga kostnaðin, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri**

Leo Poulsen

Hann stendur við evstu ábyrgd av ólavsøkuni. Borgarstjórin.

– Ólavsøkan er á skránni, meiri ella minni, alt árið ígjøgnum, men tað er sjálvandi vikurnar upp undir hátíðina, at fyrireikingarnar veruliga fara í gongd, sigur Heðin Mortensen.

Snarskivan ger ein stóran part av arbeiðinum, men borgarstjórin sjálvur er við í øllum fyrireikingarfundum og hevur fingurin á pulsinum alla tíðina.

– Tað byrjar jú við, at kunngerð verður lýst í bløðunum, har heitt verður á fólk um at boða frá, ynskja tey at skipa fyri nøkrum á ólavsøku. Tá so freistin er farin, verða umsóknirnar gjøgnumgingnar, og fólk og feløg fáa so boð um, antin tey fáa játtandi ella noktandi svar, sigur Heðin Mortensen.

Saman við Tórshavnar Ítróttaráð verður so skráin fyri ólavsøkuna løgd, og dentur verður lagdur á, at gera skránna so spennandi og fjøltáttaða sum gjørligt.

– Vit leggja stóran dent á tað mentanarliga. Tónleik, sjónleik og ítrótt. Framsýningar av ymsum slag, alt, sum hevur við mentan at gera, sigur borgarstjórin.

Talan er í ár um eina sera umfatandi skrá, sum so smátt byrjar longu fríggjadagin 23. juli, tá Áartún letur alment upp. Heðin Mortensen letur túnið upp og greiðir frá um økið kring Kongabgrúnna, meðan kokkarnir borðreiða við grillmati og Marner av Lofti stílar fyri livetónleiki.

Leygarkvøldið 24. juli verður so afturvendandi bryggjudansurin hjá Tórshavnar Bátafelag, har eisini ber til at keypa ein bita at eta.

Sunnudagin og mánadagin verða eisini nøkur tiltøk á skránni, men týsdagin 27. juli fer ólavsøkan veruliga í gongd, tá ein long røð av tiltøkum fara av bakkastokki. Millum annað verður fyrsti landskappingardysturin á ólavsøku leiktur á Argjum, har nýggja graslíkið verður tikið í nýtslu. Dysturin er móti EB/Streymi, og býráðið letur steyp til vinnandi liðið.

Týsdagin lata eisini flestu matsølurnar, pylsuvognarnir og aðrar ólavsøkukendar sølubúðir upp.



*Einasta, landið spýtir í ólavsøkuna, er skrúðgongan úr Tinginum oman í Dómkirkjuna og niðan aftur í Tingið*

*Savnsmynd*



*Stórur dentur verður lagdur á, at ikki alt skal kosta pengar. Tiltøkini á Tórspalli verða ókeypis, og tað verða hoppiborgirnar á Skálatrøð eisini*

*Savnsmynd*

### Tivoli á Skálatrøð

Ólavsøkuaftan byrjar ólavsøkan so veruliga. Flestu tiltøk byrja longu klokkan 10 ella 11 fyrrapart, og fyrsta stóra hendingin á ólavsøku verður, tá gomlu træseglskipini stevna inn á Havnina um 11.30-tíðina. Tey luttaka í sonevndu Føroya Regatta 2010, sum byrjar mánadagin 26. juli og endar sum nevnt ólavsøkuaftan á Havnini, har høvi verður hjá fólki at vitja umborð á teimum fimm sluppunum, Westward Ho, Jóhonnu, Norðlýsinum, Draganum ella Fram.

Klokkan 14 verður so ólavsøkuskrúðgongan úr Kommunuskúlagarðinum oman á Vaglið við hornblásarum, ítróttafólki og býráðslimum. Tað verður í ár Njál Djurhuus, sum fer at seta ólavsøkuna.

Ólavsøkuaftan er eisini stóri dagurin, hvat tiltøkum viðvíkur. Ikki minst kappróðurin dregur nógv fólk, og róðurin byrjar klokkan 14.30 við barnaróðri, meðan vaksnamannaróðurin verður klokkan 15.

Klokkan 15 letur eisini tivoli upp á Skálatrøð. Alt, sum fyrr plagdi at vera í Kommunuskúlagarðinum, varð í fjør flutt oman á Skálatrøð, og tað vísti seg at rigga heilt væl.

– Vit gjørdust onkrar royndir klókari frá í fjør, so í ár skuldi verið enn betri við tivoli á Skálatrøð. Plássið er jú nógv størri enn í Kommunuskúlagarðinum, sigur Heðin Mortensen.

Í tivoli verður millum annað bamsutombola, 21-spæl, fiskibrunnur, ballónir, blandað tombola, skjótibásur, karusellir, bóltkast, pílakast og ymiskt til matna.

- Vit hava roynt at lagt doyin á, at ikki alt skal kosta, og tí verður ókeypis hoppiborg í tivoli, sigur Heðin Mortensen.

Eitt annað, sum eisini verður ókeypis, er sonevndi Tórspallur. Hann verður settur upp á Vaglinum, norðan fyri ráðhúsið, og klokkan 18 verður undirhald fyri børn báðar dagarnar. Annars verða kend nøvn á palli eisini, ólavsøkuaftan Kim Hansen og síðani Eyðun og Terji, og ólavsøkukvøld verður kendi íslendski tenorurin, Gissur Páll Gissurarson og Anna Guðný Guðmundsdóttir at hoyra.

### Ítróttur sum vanligt

Eitt annað, sum býráðið hevur lagt stóran dent á, er ítrótturin um ólavsøkuna. Sum nevnt byrjar fótbólturin longu týsdagin, og ólavsøkuaftan spælir HB landskappingardyst móti B71 á ovara vølli í Gundadali. Eisini hesin dysturin verður skipaður sum steypadystur. Og sama er galdandi ólavsøkudag, tá B36 tekur ímóti Víkingi. Eisini til tann dystin letur býráðið steyp.

– Nú mistu vit steypafinaluna út um Havnina hesaferð, so tú kanst siga, at hetta er eitt lítið plástur á sárið, sigur Heðin Mortensen.

Ólavsøkuaftan verður eisini afturvendandi dysturin millum Kyndil og VÍF í høllini á Hálsi klokkan 20, og ólavsøku kappríðingin verður í Marknagili klokkan 14 ólavsøkudag.

Árliga ólavsøkurenningin verður longu týsdagin klokkan 18. Runnið verður av Skálatrøð, undir Bakka og runt um Fabrikkina.

Ólavsøkukonsertin verður somuleiðis týsdagin. Hon verður í Tórsgøtu og byrjar klokkan 20 og heldur fram heilt til klokkan 03.30 um morgunin.

Tað hevur verið nakað av togan aftur og fram millum býráðið og FUT, sum áður hevur skipað fyri ólavsøkukonsertini.

– Orsøkin til, at vit hava valt at yvirtikið ólavsøkukonsertina er,